Grind Forever

Bárður Olsen
semic@post.olivant.fo

Tað verður tosað um at gangnýta tilfeingi í havinum.

Ætlanin er at fara undir stórhvalaveiðu.

Hetta er veruleikafjart og tokutos. Hava vit brúk fyri at veiða stórhval? Svarið er nei. Vit hava klárað okkum uttan í so nógv ár. Tað ger einki, um stórhvalirnir fáa frið. Tað er kanska ætlanin at útflyta stórhvalatvøst til Japan, men hví gera teirra skitna verk? Stórhvalaveiða hoyrir fortíðini til. Tað er í lagi, at grønlendingar og onnur uppruna-fólk veiða stórhval, tí tey hava brúk fyri tí. Náttúran skal bara gagnnýtast, tá tað er neyðugt. Fáa vit ikki nokk av pcb og kyksilvuri frá grindahvalum, tola vit meira? Spurningurin er, um vit eiga at halda áfram við at drepa grind. Kanska um nøkur ár fara grindamennirnir ristandi av kyksilvureitran oman á sandin, rópandi:

»Vit drepa grind, tí tað er okkara mentan!«

Grind er sera góður matur, eingin ivi um tað. Fyrr ella seinni mugu vit vera realistisk og gevast við at eta tvøst og spik. Tak ikki feil, eg eri ikki eitt býarmenniskja, ið ongantíð hevur verið við í grindadrápi.

Tað er vandamikið at roykja, og tað er vandamikið at eta grind.

Føroyar hava ongan umhvørvispolitikk. Løgi, tá eg hugsi um, at vit liva av havsins tilfeingi. Myndugleikarnir skuldu gingið á odda sum ein góð fyrimynd, men gevur tað ikki profitt, so tíma teir ikki at spæla við.

Eg trúgvi ikki, at føroysku heilsumyndugleikarnir hava nossir til at siga, at nú er grindin ov nógv dálkað til at vera egnað sum mannafóði. Tað hevði ført til rámaskríggj ella kríggj.

Tað er sjálvandi keðiligt, at sjógvurin er so illa dálkaður. Tey sum dálka eru ídnaðarlondini. Men líka sum her er tað galdandi har:

»Out of sight out of mind«

Tað hevði kanska ikki gjørt stóran mun, um myndugleikarnir høvdu havt ein aktivan umhvørvispolitikk, men tað hevði í hvussu so er ikki gjørt støðuna verri. Ikki fyrr enn nú byrja politikararnir at orða ein umhvørvispolitik, álvaratos er tað ikki naka seint?

Sjálvandi betri seint enn ongantíð.

Dálking spyr ikki um landamørk. Hav okkara sigst vera heimsins reinasta. Tað er í hvussu so er ikki okkum fyri at takka.

Um sami ídnaður var í Føroyum, sum arðastaðni var tað líka skitið – ella skitnari, tí umhvørvið leggja tey flestu einki í.

Vikuskifti

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720,
teldupostur: eirikur@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Eirikur Lindenskov

Arbeiðið – ein arbeiðaraavís

6. mai 1976 hevði Sosialurin grein um eitt nýtt føroyskt blað. Vit endurgeva greinina:

FYRI 25 ÁRUM SÍÐANI

Sosialurin

1. mai kom eitt nýtt blað út. Blaðið kallast »Arbeiðið« og er blað Oyggjaframa Marx-Leninista. Ábyrgdarblaðstjóri er Herman Oskarsson.

Hann sigur, at grundin til, at felagið er farið undir at geva eitt blað út, er hon, at tað arbeiðandi fólkið ikki hevur eitt blað, tey kunnu seta sína meining í.

Hermann Oskarsson sigur, at arbeiðarabløðini ganga aðra leið enn arbeiðarastættin, tí er tørvur á eini arbeiðaravís.

KFF ongar røtur í føroyska samfelagnum

Í Arbeiðið stendur, at Kommunistiski Flokkur Føroya, KFF, ið varð stovnaður, sambært Arbeiðið »sum ketta úr høvdatrog«, ikki hevur røtur í føroysku arbeiðarastættini.

Hevur OFML røtur í føroysku arbeiðarastættini?

– Oyggjaframi hevur virkað síðani 1969 og alla tíðina luttikið í ymiskum tiltøkum. Upprunaliga gav felagið Roðan út. Vit hava fingið okkum eina vitan um føroyska samfelagið, sum vit hava bygt okkara stevnu uppá og ikki beinleiðis sett hana eftir skráum hjá øðrum kommunistaflokkum, sum KFF hevur gjørt, sigur Herman Oskarsson.

Útbúgving úr Moskva

Oyggjaframi varð stovnaður síðst í trýssunum sum ein deild av felagnum í Keypmannahavn.

Herman Oskarsson sigur, at í felagnum var lítið virksemi, og at limir ynsktu eina skúling.

Felagið varð umskipað og fekk sær lesitilfar frá marxist-lenistiskum lesiringum í hinum Norðurlondum og skifti navn til OFML í 1972 — um sama mundið, sum føroyingar fingu kommunistiskiska útbúgving í Moskva. (Teir, sum standa aftan fyri KFF)

Ov lítið samarbeiði

Blaðstjórin á Arbeiðið sigur, at tað er alt ov lítið samstarv millum teir føroysku sosialistafelagsskaparnar. Hann sigur, at Arbeiðið og teir vilja skapa eitt samarbeiði við kjaki — frítt orðaskifti, ikki kompromiss'ir.

Oyggjaframi hevur havt stevnur við Føroyskar Sosialistar, sum felagið í Keypmannahavn nú kallast, og ein fund við KFF. Í Arbeiðið stendur, at Oyggjaframi vil skapa eina eind.

– Hvussu nógvir limir hevur Oyggjaframi?

– Næsti spurningur…

Hava tit nakrar arbeiðarar sum limir?

– Jú, meiri enn so.

Blaðstjórin á Arbeiðið, Herman Oskarsson

Vil hava vegastrekki í miðbýnum stoypt

Í februar 1976 hevði Ólavur Michelsen, býráðslimur í Havn, uppskot um at avmarka ferðsluna, píkarnar og um at nýta betong heldur enn asfalt til vegirnar

FYRI 25 ÁRUM SÍÐANI

Sosialurin 28. februar 1976

Tey nógv umrøddu píkadekkini vóru fyri í býráðnum í Havn hóskvøldið. Ólavur Michelsen hevur sent býráðnum bræv um píkadekkini og ferðsluna í býnum og mælir til, at bert hýruvognar fáa loyvi til at brúka píkadekk. Samstundis skjýtur Ólavur Michelsen upp, at bilar av bygd eisini skulu fáa loyvi at brúka píkadekk treytað av, at teir koyra eftir ávísum gøtum til og frá býnum.

Í brævinum, sum er ætlað teknisku nevnd, sigur Ólavur Michelsen, at uppskot um alvegis bann av píkadekkum letur seg neyvan seta í verk. Hugsaðu verður um her at avmarkað nýtsluna soleiðis, at bert hýruvognar í Havn fáa loyvi at brúka píkadekk í býnum, og at avbygdabilar fáa loyvi til at koyra til ávís parkeringspláss, t. v. s. at teir ikki fáa loyvi at koyra runt í býnum við píkadekkum.

Stoypi vegastrekki

Ólavur Michelsen skjýtur eisini upp, at eitt nógv trafikerað vegastrekki verður stoypt sum ein roynd til tess at fáa klárlagt, um tað er beint at gera betongvegir í miðbýnum. Ólavur Michelsen sigur, at vegirnir í Havn versna ár undan ári, og at allar higartil gjørdar kanningar hava einki úrslit givið. Hann mælir til nýggjar leiðir, og at royndir eisini verða gjørdar við ymiskum øðrum asfalteringsháttum.

Ólavur Michelsen skjýtur upp at áleggja býarverkfrøðinginum vegna býráðið at áseta hámark fyri aksiltrýst á bilum, sum koyra í Havn. Hann sigur í hesum sambandi, at teir tungu lastbilarnir gera sítt til at oyðileggja gøturnar í Havn. Sambært ferðslulógina hevur fútin eftir áheitan frá býráðnum heimild til at avmarka aksiltrýstið á bilum. Umhugsað eigur eisini at verða, um hin tunga ferðslan kann beinast til ávísar vegir, sigur Ólavur Michelsen í brævi sínum til býráðið og teknisku nevnd.

Rockur on the rocks

So einfalt tekur Jyllandsposturin saman um Prix Føroyar finaluna, sum tó verður viðgjørd í tveimum greinum. Bæði Free og Prix fáa góð skoðsmál, eins og Eivør Pálsdóttir og Týr

Med den kun 17-årige – men allerede særdeles rutinerede – sangerinde Eivør Pálsdottir som det samlende midtpunkt – havde bandet givet et flot indtryk af bandets formåen, og det forbavser ikke, at netop Clickhaze løber af med sejren. Sigur Uffe Christensen, tónleikaskrivari á Jyllandspostinum.

Dagfinn Olsen

Prix Føroyar finalan var eitt brak, ið hoyrdist. Eisini innbodnir útlendskir gestir taka tiltakið og upplivilsið við sær heim og bera boð í bý. Ein teirra, ið vitjaði í ár, var Uffe Christensen, tónleikaskrivari á Jyllandspostinum.

Hann viðger í tveimum greinum tann 1. mai vitjan sína á Prix Føroyar finaluni. Eisini fekk hann konsertina Free Føroyar við.

Undir yvirskriftini Rock on the rocks greiðir hann frá føroyskum tónleikavíðurskiftum.

Hann greiðir frá, at Føroyar eru kendar fyri so mangt, men kanska vita ikki øll, at á »de forrevne klippeøer« trívist eitt breitt og entusiastiskt rockumhvørvi.

Eftir náttúrulýsingar, vitjan í Kirkjubø og hugleiðing um Klaksvíksstríðið, kemur hann til Free Føroyar.

Uffe lýsir tiltakið, ið jú er politiskt merkt. Hann fylgir bólkinum Týr: Provokation eller ej. Publikum hylder begejstret disse tónleikarar fyri loysing - musikere for løsrivelse - og det ser ikke ud til at bekymre nogen, at arrangementet gennemføres uden salg af rúsdrekka - alkohol. I hvert fald i princippet, for de fleste har uden at skjule det en øl eller to med ind i foyeren, skrivar hann millum annað.

Hann fylgir bólkinum yvir í tiltakið, ið er kvøldið eftir, nevniliga Prix Føroyar. Gjølla lýsir hann tiltakið. Og umstøðurnar í Føroyum. Uffe metir, at tónleikurin, góðskan, er hugtakandi sammet við landastødd og fólkatal, og hann lýsir viðurskiftini hesum viðvíkjandi og nevnir t.d., at út koma árliga eini 30-40 útgávur innan pop og rock.

3 ella 4 orkestur eru framúr í finaluni, metir danski tónleikakennarin. Tó metir hann, at tað er so sum so við originalitetinum.

Med den kun 17-årige – men allerede særdeles rutinerede – sangerinde Eivør Pálsdottir som det samlende midtpunkt – havde bandet givet et flot indtryk af bandets formåen, og det forbavser ikke, at netop Clickhaze løber af med sejren. Det færøske islæt er hos Clickhaze begrænset, men i den unge sangerinde anes en styrke a la Björk. På de to næste pladser kommer bands med navnene All That Rain og Tangz

Maðurin aftanvert hálvføroysku Creamy, Jens Ove Friis, sigur við danska blaðmannin:

»Det er anden gang, jeg er med til Prix Færoyer, og jeg er ganske imponeret over niveauet. I år var det især Týr, der fangede min interesse. Det hænger sammen med, at jeg føler mig overbevist om, at fornyelsen må komme fra yderområderne, hvor man dyrker egenarten. I Danmark laves der alt, alt for meget musik, der kopierer udenlandske forbilleder. Týr har så mange indlysende kvaliteter, at jeg har tilbudt dem en uge i Pukstudiet lige efter koncerten i Jelling. Så må vi se, hvad der sker«.

Jens Ove Friis tilføjer, at han også agter at tage kontakt med sangerinden Eivør Pálsdottir fra vinderbandet Clickhaze.

»På Færøerne ved musikerne ikke, hvad man ikke kan – og det er en styrke«, smiler han

Hvar er føroyska íkastið?

Í aðrari sera áhugaverdari grein, Det nationale særpræg, sóknast Uffe Christensen eftir tjóðareyðkenninum, hvar var tað serføroyska í tónleikinum, nú Prix Føroyar finalan 2001 er av?

Jo mindre et sprogområde jo mindre kymrer sangskriverne sig tilsyneladende om det nationale særpræg, skrivar Uffe Christensen.

Hann skilir hetta, men metir hetta tó sum eitt paradoks, tí tónleikurin ikki veruliga gerst áhugaverdur, fyrr enn tjóðareykenni eru við.

Otte dygtige bands spillede i finalen, men de syv bands valgte at plagiere en umiddelbar salgbar international lyd. Finalens mest interessante band – metalbandet Týr – gjorde for så vidt det samme, men med den afgørende forskel, at bandets udgangspunkt er de gamle færøske kvad, skrivar danski blaðmaðurin um Prix finaluna og leggur afturat, at hetta vakti ans millum áhoyrarar, ið dansaðu føroyskan dans aftur við.

Eivør og Týr

Uffe Christensen skilir væl, at føroyskir tónleikarar gera nógv fyri at koma út um landoddarnar, og at teir tí altjóðagera tónleikin.

Chancerne for at slå igennem i udlandet formindskes blot ligefrem proportionalt. Hvis man da ikke lige hedder Eivør Pálsdóttir og har et indlysende talent til noget stort, skrivar Uffe Christensen í Jyllandspostinum.

Hann metir avgjørt, at neyðugt er at hava beinini á heimligari jørð. Hann samanber støðuna við støðuna í Danmark. Ikki øll eiga at søkja eydnuna í altjóða høpi, men eisini tá eiga røturnar at hómast.

Uffe endar greina soleiðis:

Et meget stort antal af de allerstørste bands og solister er gennem tiderne er tæt forbundet med deres nationale særpræg. Nu prøver Týr lykken. Mulighederne i Danmark - der har omkring 4.950.000 flere indbyggere end Færøerne, må være til stede for dem, der tør satse. Også internationalt.